Bólkur C:

# Hesa ferð kiksar Bora

**Fyri fyrstu ferð er líkt til, at framúr dugnaligi venjarin ikki fær lið sítt víðari úr bólkaspælinum**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hann er nakað fyri seg, Bora Milutinovic. HM-kappingin hesa ferð er sætta ferðin, at hann stendur sum venjari hjá einum liðið, og øllum undanfarnu førunum hevur hann megna at ført landið, sum hann umboðaði víðari úr bólkaspælinum. Bragdið gerst ikki minni, tá lagt verður afturat, at tað aloftast hava verið smátjóðír í fótbóltshøpi, sum hann hevur staðið á odda fyri.

Hesa ferð er tó líkt til, at tað verður meira enn trupult hjá Bora og hansara kinesarum. Í bólki C spældi Kina móti Costa Rica. Talan var um tey á pappírinum veikastu liðini í bólkinum, og eftir dystin var eingin ivi um, at Kina er veikasta liðið í bólkinum.

Fult uppiborið vann Costa Rica – sum annars eisini hevur havt Milutinovic sum venjara – 2-0, og tað var eftir øllum at døma endin hjá Kina. Undir øllum umstøðum er sera trupult at ímynda sær, at teir skulu taka stig frá Turkalandi ella Brasilia.

### Brotssparksgáva

Hóast Brasilia vann dystin á Turkalandi, so er lítil ivi millum serfrøðingarnar um, at tað verða júst hesi bæði liðini, sum vinna seg úr bólkaspælinum.

Hóast tapið, so sýndi Turkaland aftur hesaferð, at landið heldur á fram við at gera stór framstig á altjóða fótbóltspallinum. Tað var Brasilia, sum hevði betra spælið, men leingi var tó líkt til, at Turkaland skuldi fáa annað stigið. Ikki fyrr enn dómarin í dystinum valdi at geva brasilia eitt brotsspark, sum varð framt langt uttan fyri brotsteigin, gav hetta úrslit hjá Brasilia. Fyri brotssparkið fekk Ozakan reyða kortið, og sum um hetta ikki var nóg mikið, fekk Unsal nakað seinni somuleiðis ostaskorpuna, tá hann í frustratión sparkaði bóltin eftir Rivaldo, sum tó eisini dugdi væl at fáa sum mest burtur úr hendingini.

**Úrslit:**
**Brasilia-Turkaland 2-1 (0-1)**
0-1: Hasan Gokhan Sas, 45
1-1:Ronaldo, 50
2-1: Rivaldo, 87

**Kina-Costa Rica 0-2 (0-0)**
0-1: Rónald Goméz, 61
0-2: Mauricio Wright, 65

Bólkur D:

# Alt vent á høvdinum

**Longu nú líkist tað einum farvæl til annan av favorittunum í bólkinum, eftir at bæði USA og Suður Korea vunnu á ávíkavist Portugal og Pólland**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Higartil hevur bólkur D verið ein staðfesting av, at landafrøðiliga styrkisbýtið í fótbóltsheiminum er um at skifta. Tað varð nevnliga roknað fyri vist, at tað skuldu vera Póland og Portugal, sum komu víðari úr hesum bólkinum, men eftir teir báðar fyrstu dystirnar, er hetta kortini ikki so víst. Langt ífrá.

Støðan er nevnliga tann í løtuni, at tað at kalla bert er í teoriini, at báðir favorittarnir kunnu kom víðari. Skal hetta henda, skulu báðir favorittarnir spæla javnt móti hvørjum øðrum, vinna á ávíkavist USA og Suðurr Korea og so vóna, at hesi bæði londini eisini spæla javnleik sínamillum.

### Stórur dagur hjá USA

Fyrsti skelkurin kom týsdagin, tá vertirnir úr Suður Korea spældu móti Pólandi, sum hevði sýnt stórspæl í undankappingini.

Somikið gott hevði pólska spælið, at fólk vóru farin at tosa um úrslitini í ’74 og ’82

Tá talan gjørdist um bronsumerki, men eftir dystin er hetta tagnað. Suður Korea var nevnliga allan dystin á tamb klárt betra liðið, fleiri ferðir løgdu teir stórt trýst á Póland, so hóast Dudek í málinum helst iðrar seg um, at hann ikki fekk bjargað seinna málinum, so var eingin ivi um, at sigurin var uppiborin.

Var hetta óvæntað, so var sigurin hjá USA á Portugal ikki minni óvæntaður. Portugal hevur av mongum verið mett sum ein outsidari til HM-heitið, men lítið sást til hetta mikudagin. Eftir góðum hálvum tíma var støðan 3-0 til USA, og tó at portugisararnir royndu at stríða seg innaftur í dystin, so var hetta ov nógv at vinna aftur.

Fyri USA mundi talan vera um størsta sigurin í samfull 52 ár. Í Brasiliga í 1950 vunnu teir púrasta óvæntað 1-0 á Onglandi, og tó at talan hevur verið um fleiri góð úrslit síðani tá, so er helst einki, sum kann sammetast við sigurin á Figo & Co.

**Úrslit:**
**Suður Korea-Póland 2-0 (1-0)**

1-0: Hwang Sun-Hong, 26
2-0 Yoo Sang-Chul, 53

**USA-Portugal 3-2 (3-1)**
1-0: John O’Brien, 4
2-0: sjálvmál, 30
3-0: Brian McBride, 36
3-1: Beto, 40
3-2: Sjálvmál

Bólkur G:

# Torført hjá Kroatia

**Við einum brotssparksmálið fekk Mexico best hugsandi útgangsstøðið, tá teir vunnu sín dyst á Kroatia, og Italia hevur sum væntað lagt seg á odda**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í bólki G var fyrsti dysturin millum Croatia og Mecico.

Í hesum máttu bronsuvinnararnir frá HM í ’98 lúta fyri Mexico, sum sostatt hevur vunnið sær eitt sera gott útgangsstøði í bólkinum.

Einasta málið í dystinum kom á tímanum, tá Boris Zivkovic tók beinini undan Blanco í brotsteiginum. Við hesum gjørdist Zivkovic fyrsti leikarin, sum fekk reytt kort undir HM, og eftirfylgjandi setti Blanco sjálvur bóltin í málið úr ellivu metrum.

Var úrslitið eitt gott útgangsstøði fyri Mexico, so er Kroatia í ringast hugsandi støðuni nú. Snøgt sagt skal liðið helst vinna á bæði Italia og Ecuador í teimum báðum næstu dystunum, og hetta verður í øllum førum ein trupul uppgáva.

### Vieri & Totti

Italia skuldi í sínum fyrsta dysti royna seg móti Ecuador, sum undan kappingini varð mett sum veikasta liðið í kappingini. Tað tók heldur ikki langa tíð hjá Azzuri at sannføra um, at hetta var ein løtt uppgáva fyri teirra viðkomandi.

Stóri maðurin var sum ikki eina ferð Christian Vieri, sum skeyt bæði italiensku málini, men í øllum førum fær Totti eisini æruna fyri fyrsta málið. Prinsurin av Róma legði sera hegnisliga upp til málið, sum Vieri við vinstra beininum smekkaði upp í tríkantin.

**Úrslit:**
**Kroatia-Mexico 0-1 (0-0)**
0-1: Cuauhtemoc Blanco, 60

**Italia-Ecuador 2-0 (2-0)**
1-0: Christian Vieri, 7
2-0: Christian Vieri, 27

Bólkur H:

# Vertsjóðirnar standa seg altíð

**Japanar halda enn fast um siðvenjuna, at vertstjóðirnar altíð koma víðari, og Russland liggur longu nú væl fyri**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað hevur verið siðvenja, at vertstjóðirnar í HM altíð standa seg væl. Undan hesi kappingini varð roknað við, at henda siðvenja kanska fór at punktera, men úrslitini higartil hava tó ikki givið ábendingar um, at so fer at verða.

Japan gav nevnliga Belgia ein sera skarpan gang í sínum fyrsta dysti. Eftir ein fyrra hálvleik, har ikki serliga nógv hendi, kom veruliga ferð á seinna umfarið.

Alt byrjaði við einum framúr góðum málið, tá Marc Wilmots saksaparkið í bóltin í netið. Japanar svaraðu alt fyri eitt aftur, og brádliga vóru teir frammanfyri, tá Arsenal leikarin, Inamoto, fór sjálvur ígjøgnum belgisku verjuna. Reyðu devlarnir fingu tó bjargað sær annað stigið, og halda tí framvegis fast í vónini um at vinna seg víðari úr bólkaspælinum.

### Russland er væl fyri

Framman undan hesum dystinum høvdu Russlan og Tunis sett hol á bólkin. Hóast teir máttu bíða fram til seinna hálvleik, so er neyvan nakar, sum av røttum kann siga, at russiski sigurin ikki var uppiborin. Til tíðir var talan um maskinfótbólt av besta slag, har afrikanarnar runnu runt í russisku kombinatiónunum.

Yegor Titov og Valeri Karpin, sum báðir hava verið millum málskjúttarnir móti Føroyum skutu russisku málini.

**Úrslit:**
**Japan-Belgia 2-2 (0-0)**
0-1: Marc Wilmots, 57
1-1: Takayuki Suzuki, 59
2-1: Junichi Inamoto, 68
2-2: Peter Van der Heyden, 75

**Rusland-Tunis 2-0 (0-0)**
1-0: Yegor Titov, 59
2-0: Valeri, 55



Bólkur E:

# Trý um boðið

**Bert Saudi Arabia tykist verið úti úr kappingini um at koma víðari, og týski stórsigurin á Saudi Arabia kann fáa stóran týdning**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Týski stórsigurin á Saudi Arabia í fyrsta umfarinum kann vísa seg at fáa stóran týdning fyri, hvussu endaliga støðan í bólki E verður. Ikki minst eftir at tað mikudagin eydnaðiast írum at javna í yvirtíðini móti Týsklandi, og eftir at Cameroon hósdagin vann á botnproppinum í bólkinum.

Týskarar lógu annars leingi til at vinna á írum, eftir at Miroslav Klose skeyt sítt 12. landsliðsmál í 14 dystum móti Írlandi. Írar góvust tó ongantíð. Væl stuðlaðir av trúgvu áskoðarunum hildu teir á fram at trýsta, og tá tveir minuttir vóru lidnir av tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat teimum 90, fingu teir so løn fyri stríðið, tá Robbie Keane javnaði.

Javnleikurin hjá Írlandi ge, at um teir megna at vinna við meira enn einum máli móti Saudi Arabia, sum longu er sligið út úr kappingini, so gerast teir nummar tvey í bólkinum.

Cameroon megnaði nevnliga ikki eins og Týskland at vinna stórsigur á veikasta liðnum í bólkinum, og eru teir tí noyddir at vinna dystin á Týsklandi, um teir sjálvir skulu gera av, hvørt teir skulu koma víðari úr bólkaspælinum ella ikki. Stórsigurin hjá Týsklandi í fyrsta dystinum merkir eftir øllum at døma, at teir verða vinnarar av bólkinum, um teir í seinasta dystinum fáa í øllum førum javnleik.

**Úrslit:**
**Týskland-Írland 1-1 (1-0)**
1-0: Miroslav Klose, 18
1-1: Robbie Keane, 90

**Cameroon-Saudi Arabia 1-0 (0-0)**
1-0: Samuel Eto’o, 65

## Máltindurin, HM

| | | |
|---|---|---|
| Miroslav Klose | Týskland | 4 |
| Jon Dahl Tomasson | Danmark | 3 |
| Christian Vieri | Italia | 2 |
| Gabriel Omar Batistuta | Argentina | 1 |
| Marc Wilmots | Belgia | 1 |
| Peter Van der Heyden | Belgia | 1 |
| Rivaldo | Brasilia | 1 |
| Ronaldo | Brasilia | 1 |
| Patrick Mboma | Cameroon | 1 |
| Samuel Eto'o | Cameroon | 1 |
| Mauricio Wright | Costa Rica | 1 |
| Rónald Gomez | Costa Rica | 1 |
| Matt Holland | Írland | 1 |
| Robbie Keane | Írland | 1 |
| Junichi Inamoto | Japan | 1 |
| Takayuki Suzuki | Japan | 1 |
| Cuauhtemoc Blanco | Mexico | 1 |
| Sol Campbell | Ongland | 1 |
| Francisco Arce | Paraguay | 1 |
| Roque Santa Cruz | Paraguay | 1 |
| Beto | Portugal | 1 |
| Egor Titov | Russland | 1 |
| Valery Karpin | Russland | 1 |
| Papa Bouba Diop | Senagal | 1 |
| Salif Alassane Diao | Senagal | 1 |
| Sedastjan Cimirotic | Slovenia | 1 |
| Fernando Hierro | Spania | 1 |
| Juan Carlos Valerón | Spania | 1 |
| Raul González | Spania | 1 |
| Estanislao Struway | Suður Afrika | 1 |
| Quinton Fortuna | Suður Afrika | 1 |
| Hwang Sun-Hong | Suður Korea | 1 |
| Yoo Sang-Chul | Suður Korea | 1 |
| Niclas Alexandersson | Svøríki | 1 |
| Bernd Schneider | Týskland | 1 |
| Carsten Jancker | Týskland | 1 |
| Michael Ballack | Týskland | 1 |
| Oliver Bierhoff | Týskland | 1 |
| Thomas Linke | Týskland | 1 |
| Hasan Gokhan Sas | Turkaland | 1 |
| Dario Rodriguez | Uruguay | 1 |
| Brian McBride | USA | 1 |
| John O'Brien | USA | 1 |
| Sjálvmál | | 2 |

## Dystarskráin

**Onkrar villur høvdu sníkt sg inn í dystarskránna, sum vit prentaðu í leygardagsútgávu okkara, og tí verður øll dystarskráin fyri HM endurprentað í fullum líki**

Bólkaspælið

| Dagur | Bólkur | Kl. | Staður | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 07-Jun | F | 7:30 | Kobe | Svøríki | - Nigeria |
| 07-Jun | B | 10:00 | Chonju | Spania | - Paraguay |
| 07-Jun | F | 12:30 | Sapporo | Argentina | - Ongland |
| 08-Jun | B | 7:30 | Taegu | Suður Afrika | - Slovenia |
| 08-Jun | G | 10:00 | Ibaraki | Italia | - Kroatia |
| 08-Jun | C | 12:30 | Sogwipo | Brasilia | - Kina |
| 09-Jun | G | 7:30 | Miyaki | Mexico | - Ecuador |
| 09-Jun | C | 10:00 | Inchon | Costa Rica | - Turkaland |
| 09-Jun | H | 12:30 | Yokohama | Japan | - Russland |
| 10-Jun | D | 7:30 | Taegu | Suður Korea | - USA |
| 10-Jun | H | 10:00 | Oita | Tunis | - Belgia |
| 10-Jun | D | 12:30 | Chonju | Portugal | - Póland |
| 11-Jun | A | 7:30 | Inchon | Danmark | - Frakland |
| 11-Jun | A | 7:30 | Suwon | Senegal | - Uruguay |
| 11-Jun | E | 12:30 | Shizuoka | Cameroon | - Týskland |
| 11-Jun | E | 12:30 | Yokohama | Saudi Arabi | - Írland |
| 12-Jun | F | 7:30 | Osaka | Nigeria | - Ongland |
| 12-Jun | F | 7:30 | Miyaki | Svøríki | - Argentina |
| 12-Jun | B | 12:30 | Sogwipo | Slovenia | - Paraguay |
| 12-Jun | B | 12:30 | Taejon | Suður Afrika | - Spania |
| 13-Jun | C | 7:30 | Suwon | Costa Rica | - Brasilia |
| 13-Jun | C | 7:30 | Seoul | Turkaland | - Kina |
| 13-Jun | G | 12:30 | Yokohama | Ecuador | - Kroatia |
| 13-Jun | G | 12:30 | Oita | Mexico | - Italia |
| 14-Jun | H | 7:30 | Shizuoka | Belgia | - Russland |
| 14-Jun | H | 7:30 | Osaka | Japan | - Tunis |
| 14-Jun | D | 12:30 | Taejon | Póland | - USA |
| 14-Jun | D | 12:30 | Inchon | Suður Korea | - Portugal |

### 1/8-finalur

| Dagur | Dystur | Kl. | Staður | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 15-Jun | I | 7:30 | Sogwipo | Vinnari E | - Tvey'ari B |
| 15-Jun | J | 12:30 | Niigata | Vinnari A | - Tvey'ari F |
| 16-Jun | K | 7:30 | Oita | Vinnari F | - Tvey'ari A |
| 16-Jun | L | 12:30 | Suwon | Vinnari B | - Tvey'ari E |
| 17-Jun | M | 7:30 | Chonju | Vinnari G | - Tvey'ari D |
| 17-Jun | N | 12:30 | Kobe | Vinnari C | - Tvey'ari H |
| 18-Jun | O | 7:30 | Miyaka | Vinnari H | - Tvey'ari C |
| 18-Jun | P | 12:30 | Taejon | Vinnari D | - Tvey'ari G |

### Fjórðingsfinalur

| Dagur | Dystur | Kl. | Staður | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 21-Jun | I | 7:30 | Shizuoka | Vinnari J | - Vinnari N |
| 21-Jun | II | 12:30 | Ulsan | Vinnari I | - Vinnari M |
| 22-Jun | III | 7:30 | Kwangju | Vinnari L | - Vinnari P |
| 22-Jun | IV | 12:30 | Osaka | Vinnari K | - Vinnari O |

### Hálvfinalur

| Dagur | Dystur | Kl. | Staður | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 25-Jun | SF I | 12:30 | Seuol | Vinnari II | - Vinnari III |
| 26-Jun | SF II | 12:30 | Saitama | Vinnari I | - Vinnari IV |

| Dystur um 3. plássið | | Staður | | |
|---|---|---|---|---|
| 29-Jun | 12:00 | Taegu | Tapari SF I | - Tapari SF II |

| Finaludystur | | Staður | | |
|---|---|---|---|---|
| 30-Jun | 12:00 | Yokohama | Vinnari SF I | - Vinnari SF II |

# HM-støður

**Bókur A**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Danmark | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 2 Senegal | 2 | 1 - 1 - 0 | 2 | 1 | 1 | 4 |
| 3 Uruguay | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 4 Frakland | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |

**Bólkur B**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Spania | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 2 Suður Afrika | 1 | 0 - 1 - 0 | 2 | 2 | 0 | 1 |
| 3 Paraguay | 1 | 0 - 1 - 0 | 2 | 2 | 0 | 1 |
| 4 Slovenia | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |

**Bólkur C**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Costa Rica | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 2 Brasilia | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 3 Turkaland | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 4 Kina | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |

**Bólkur D**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Suður Korea | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 2 USA | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 3 Portugal | 1 | 0 - 0 - 1 | 2 | 3 | -1 | 0 |
| 4 Póland | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |

**Bólkur E**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Týskland | 2 | 1 - 1 - 0 | 9 | 1 | 8 | 4 |
| 2 Cameroon | 2 | 1 - 1 - 0 | 2 | 1 | 1 | 4 |
| 3 Írland | 2 | 0 - 2 - 0 | 2 | 2 | 0 | 2 |
| 4 Saudi Arabia | 2 | 0 - 0 - 2 | 0 | 9 | -9 | 0 |

**Bólkur F**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Argentina | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 2 Svøríki | 1 | 0 - 1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 3 Ongland | 1 | 0 - 1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 4 Nigeria | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |

**Bólkur G**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Italia | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 2 Mexico | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 3 Kroatia | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 4 Ecuador | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |

**Bólkur H**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Russland | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 2 Japan | 1 | 0 - 1 - 0 | 2 | 2 | 0 | 1 |
| 3 Belgia | 1 | 0 - 1 - 0 | 2 | 2 | 0 | 1 |
| 4 Tunis | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |